# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Tað er klassamunur millum Rumenia og Føroyar*

*Jógvan Martin Olsen, landsliðsvenjari*



*Føroyski landsliðsvenjarin ivast ikki í, at rumensku spælararnir eru serstakliga uppsettir, nú teir júst koma frá eini eyðmýking á heimavølli*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Betur um Rumenia vann

**Einasti spurningurin hjá Jógvan Martini Olsen undan landsdystinum í morgin er, um hann skal seta Leif Niclasen ella Pætur Dam Jacobsen inn á tøka plássið**

**FÓTBÓLTUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Gitingarnar hava ofta verið nógvar, tá føroyska fótbóltslandsliðið skal setast á taktiktalvuna. Í Beograd var støðan einki undantak í so máta, og landsliðsvenjarin gav tá eisini til kennar, at hann ikki hevði nakra heilt upplagda byrjunaruppstilling.

## Tveir spurningar

Avrikið í Beograd gjørdi tó tann spurningin lættari, staðfesti Jógvan Martin Olsen, tá vit hittu hann eftir føroysku landsliðsvenjingina týsmorgunin.

- Tað eru serliga tveir møguleikar, sum eg hugsi um. Annar er at flyta Jóhan Troest Davidsen yvir á høgra bakk og so kundi Leif Niclasen verið eitt gott boð vinstrumegin. Og hin er at taka ein nýggjan mann inn á høgra bakk, sigur Jógvan Martin Olsen.

- Fyrimunurin við tí seinna møguleikanum er, at vit tá halda fast um samstarvið, sum var í vinstru síðu í Beograd. Skulu vit flyta Jóhan yvir, so skal Leif inn, og hann hevur ikki spælt saman við eitt nú Jón Róa og Símun, so tá leggja vit upp til nýtt samstarv í báðum borðunum, sigur Jógvan Martin.

## Særdir rumenar

Um dystin sjálvan sigur Jógvan Martin, at hetta uttan iva verður ein uppgáva, sum er minst líka trupul, sum hon var í Beograd. Eisini tí Rumenia leygardagin fekk av at vita frá Litava.

- Eg hevði faktiskt heldur viljað, at Rumenia vann dystin móti Litava. Tí Rumenia er framvegis ein av teimum sterku tjóðunum í Europa, og teir eru særdir. Eg sá eisini dystin hjá teimum móti Litava, og talan er um eitt lið, sum megnar at flyta bóltin nógv skjótari, enn Serbia gjørdi tað, so talan verður um eina uppgávu, sum er minst líka trupul sum tann í Beograd.

So tað verður eitt føroyskt landslið við sama konsepti, sum vit sóu í Beograd.

- Ja. Eg trúgvi eisini, at tað er øgiliga týdningarmikið, at vit sláa fast, at tað er klassamunur millum Rumenia og Føroyar. Skulu vit hava eitt líkinda úrslit, so er tað altavgerandi, at vit síggja eitt avrik, sum í minsta lagi er á sama støði, sum tað var í Beograd, sigur Jógvan Martin Olsen.

# Evald og Eyðun eru jarnmenn

**Um vikuskiftið hava Evald Rasmussen og Eyðun Rannváarson verið í stórari triathlon kapping í Sherborne Onglandi**

**TRIATHLON:**
*Tíðindaskriv:*

Føroyar fingu í vikuskiftinum tveir Ironmen afturat. Eitt megnar avrik hjá the grand old man innan triathlon, Evald Rasmussen og Eyðun Rannváarson.

Um vikuskiftið luttóku Evald og Eyðun í stórari kapping í Sherborne Onglandi. Talan var um eina sokallaða Ironman kapping, sum er 3,8 km svimjing, 180 km súkkling og eitt marathon í renning. Einasti føroyingur, sum áður hevur fullført slíka kapping, er Oddvin Zachariassen.

Báðir hava brúkt um eitt ár at fyrireika seg til kappingina, so nakað stóð upp á spæl. Teir ætlaðu báðir í fyrsta umfari at klára kappingina millum 12 og 13 tímar. Men teir eru eisini kappingarfólk, so ein kapping teirra millum lá í luftini alla tíðini, tí hvørgin vildi lata hin sleppa framum.

Evald og Eyðun siga, at svimjingin var tað ringasta: 1500 svimjarar svumu 3800 m í einum smølum vatni, sum mest minti um ein runuhyl, og var deilt upp eftir miðjuni, so svimjast kundi báðar vegir. Tað var so eitt, men verri var, tá allir íðkararnir skuldu svimja runt um vendiboyurnar. Eitt kaos av einari aðrari verð.

Hinvegin dámdu teimum 180 km longu súkkluleiðina væl. Nógvar brekkur, eitt sindur av vindi, og so nakrar undanbrekkur, har ferðin kom upp móti 100 km/t. Vindurin darvaði ikki nakað, tí runnavøkstur var fram við vegnum alla leiðina. Hægsta punktið á leiðini var 200 m, sama sum Velbastaðhálsur.

Marathonleiðin, 42,195 km, var á økinum kring Sherborne Castle og í sjálvum Sherborne býi. Eisini her vóru brekkur, skógur og vøtn, sum runnið var fram við og ígjøgnum. Hetta gjørdi, at renningin ikki bleiv keðilig, og tí føldist lættari enn hon í veruleikanum átti.

Í samlaðu støðuni gjørdist Evald nummar 484 við tíðini 12 tímar, 34 minuttir og 8 sekund. Eyðun gjørdist nummar 618 í tíðini 12.57.36.



*Tað eru ikki smávegis teinar, sum verða lagdur aftur um bak, tá Ironman-kappingar eru á skránni. Íalt er talan um 226 kilometrar, sum skulu svimjast, súkklast og rennast*